# Miðlahúsið á ferð við »T



*Seinasta hondin verður løgd á "Tunnilsekspressina", meðan eldri menn, sum eisini eru í Vágsbotni hendan morgunin, tosa um størsta frambrot í føroyskari samferðslusøgu*



*Børn í hópatali dansa føroyskan dans í Gásadali, nú dansistevna er í Vágum*



*Ábyrgdarblaðstjórin í "Bláa stólinum" í Gásadali*



*Bibi var eisini í Gásadali í góðveðrinum*

Føroyska meginlandið er nú vorðið nógv størri. Tað røkkur heilt úr Kirkjubønesi í suðri, Gásadali í vestri til Viðareiðis í norði. Undan upplatingini av Norðoyatunlinum hevur Sosialurin havt fleiri síður við áhugaverdum søgum og frásagnum, sum á ymiskan hátt hava tilknýti til hetta samferðsluliga frambrot. Sjálvan dagin, tá ið tunnilin læt upp, skipaðu vit fyri útferð, sum byrjaði í Vágsbotni og endaði á Viðareiði

**ÚTFERÐ**

*Orð & myndir:*
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað tykist ikki vera langt síðan, at Anfinn Kallsberg, táverandi løgmaður, alment skjeyt fyrsta skotið í Leirvík til undirsjóvartunnil undir Leirvíksfirði. Í samrøðu við Sosialin segði hann, at verkætlanin við Vágatunlinum hevur verið ein "dundrandi succes", sum hann tók til. Samstundis segði løgmaður seg vóna – og eisini vænta, at byggingin av Norðoyatunlinum fór at gangast væl í hond. Tað var hann líkasum onga løtu í iva um, læt hann okkum skilja.

Lagið var gott á klettinum í Leirvík hendan dagin, tá ið hol varð sett á Føroya størsta samferðsluliga frambrot nakrantíð.

Nakað seinni, tá ið tunnilin nærkaðist sjóvarmálanum leirvíkarmegin, tosaðu vit eisini við Niclas Foldbo, verkfrøðing, sum hevur verið við í flestu tunnilsbyggingum í Føroyum í nýggjari tíð. Hann var eisini rættiliga optimistiskur, og væntandi, at henda verkætlan saktans fór at lata seg fremja í verki. Niclas vísti á, at kanningarnar av havbotninum vóru góðar, og at líkt var til, at viðurskiftini undir Leirvíksfirði sum heild vóru minst líka góð – um ikki betur, enn undir Vestmannasundi.

Vit kunnu siga, at bjartskygni ráddi frá fyrsta degi til tann seinasta.

Næstsíðsta leygardag kom so løtan, sum so mong hava bíðað í spenningi eftir. Norðoyatunnilin var liðugur og skuldi latast upp fyri almennari ferðslu – og enntá út við hálvt ár fyri upprunaligu tíðina.

Nógv hevur verið gjørt burtur úr hesi størstu hending í okkara samferðslusøgu, bæði í útvarpi, sjónvarpi og bløðum.

Meginøkið er vorðið nógv størri – við nógv fleiri møguleikum, ikki minst á vinnuliga økinum. Aftrat nýggju møguleikunum við Vágatunlinum og Norðoyatunlinum, hevur Suðuroyggin eisini fingið stóra og nútíðarhóskandi ferju, sum er sambindingarlið millum stóra meginøkið og perluna, sum Suðuroyggin er.

### Tunnilsekspressin

Vit á Sosialinum valdu eisini at »markera« hesa stórhending, har Føroyar hava fingið eitt nógv størri meginland, sum røkkur heilt úr Kirkjubønesi í suðri, Gásadali í vestri til Viðareiðis í norði. Undan upplatingini av Norðoyatunlinum høvdu vit fleiri áhugaverdar søgur og frásagnir, sum á ymiskan hátt hava tilknýti til hetta samferðsluliga frambrot.

Og sjálvan dagin, tá ið tunnilin læt upp, leygardagin, 29. apríl, skipaðu vit fyri útferð, sum byrjaði í Vágsbotni um 10-tíðina hendan morgunin.

Við "Tunnilsekspressini", sum var prýdd við føroyskum fløggum og onkrari plakat, sum segði, hvaðani vit komu, løgdu vit leiðina vestur til Gásadals.

Í bussinum vantaði hvørki matur ella drekka. Gott smyrjibreyð, bakstur av ymiskum slagi og okkurt leskandi. Lagið var gott, og sjálvur ábyrgdarblaðstjórin gekk runt í bussinum í hatti og beyð øllum vælkomnum á hesa søguligu ferð.

Veðrið var av tí fagrasta, tá ið bussurin steðgaði í lítlu og sjarmerandi bygdini, Gásadali.

Blái stólurin, sum vit høvdu við í bussinum, varð settur út um, og vit avmyndaðu ymiskar persónar í stólinum – við